Danskur professari í Børsen:

Ivast um føroysku grannskoðararnar

Føroyingar halda donsk grannskoðarafeløg burtur við lóg. Børge Dahl, professari á Handilsháskúlanum í Danmark ivast um tey trý føroysku grannskoðarafeløgini megna at halda lógarásettu grannskoðanina í Føroyum

Føroyar vunnu aftur eitt forsíðupláss í donsku bløðunum í gjár. Avhildna danska fíggjardagblaðið Børsen nýtir alla ovaru helvt av forsíðuni at greiða frá, at ivi er um føroysku grannskoðanina.

Í Føroyum eru trý grannskoðaravirkir við statsautoriseraður grannskoðarum og hesi virkir býta føroysku grannskoðanina millum sín, tað verið seg tann privata sum tann almenna. Føroysk lóg smekkar hurðarnar aftur fyri útlendskum grannskoðarafeløgum og tey føroysku feløgini hava einarætt at grannskoða rokniskapir í Føroyum. Undantak kann bert gevast, um føroysku virkini eru ovbyrjaði.

Børge Dahl, professari ivast um hesi trý virkini megna at grannskoða alt fyritakssemi í Føroyum forsvarliga. Danmark, sum limaland í ES, hevur onga lóg sum sigur, at bert donsk grannskoðarafeløg kunnu grannskoða í Danmark.

Føroysk lóg sigur, at grannskoðarin skal búgva í Føroyum, um hann skal virka her.

Børge Dahl, professari hevur í eini grein í tíðarritinum »Revision & Regnskabsvæsen« gjøgnumgingið føroysku løggávuna fyri grannskoðan.

Hann heldur, at møguleikarnir fyri eini álítandi grannskoðan av rokniskapum í Føroyum eru burtur, tá bert trý grannskoðarafeløg kunnu taka sær av hesum.

– Spurningurin er, um trý feløg eru nógmikið til at nøkta tørvin at gera ta lógarásettu statsautoriseraðu grannskoðanina, skrivar Dahl.

Í Danmark eru ongar reglur fyri at grannskoðarin, sum virkar í Danmark, eisini skal búgva í landinum.

Føroyskir myndugleikar kunnu gera frávik í lógini og geva eitt nú donskum feløgum loyvi at grannskoða í Føroyum, men bert um tað hóvar føroyingum. Grannskoðanin er sambært lóg frá 1948 føroyskt sermál.

Fíggjareftirlitið visir aftur

Danska Fíggjareftirlitið hevur sligið fast, at banka og sparikassalógin ikki sigur, at grannskoðarin skal búgva á staðnum hann arbeiðir, og at tað sostatt ikki er heimild í hesi lógini at halda donskum grannskoðarum burtur frá at grannskoða í Føroyum. Banka og sparikassalógin er eisini galdandi fyri Føroyar.

Men hendan avgerð er víst aftur av danska vinnulívskærunevndini, (Erhvervsankenævnet) ið hevur sligið fast, at føroyski heimastýrisrætturin eisini er galdandi fyri grannskoðarar.

Kærumálið

Kærumálið snúði seg um ein føroyskan banka, ið hevði valt ein danskan grannskoðara, og sum fekk boð um at skifta gannskoðaran út við ein føroyskan á næsta ársaðalfundi

Børge Dahl skrivar, at tað er eitt ynski frá politiskari síðu í Føroyum, at grannskoðararnir skulu búgva í Føroyum.

justinus

Trý feløg fáa alla køkuna

Børge Dahl sigur, at tað er eitt politiskt ynski at ríkisgóðkendu grannskoðararnir skulu búgva í Føroyum


Í Føroyum eru í løtuni fýra ríkisgóðkendir grannskoðarar. Teir eru Pauli Ellefsen, ið rekur virkið við 11 skrásettum grannskoðarum. Jógvan Sundstein og Jógvan Joensen, ið reka grannskoðaravirkið Inpact. Har arbeiða 10 skrásettir grannskoðarar. P/F Grannskoðarafelagið, har Klaus Rasmussen er ríkisgóðkendur grannskoðari. Hetta er virkið sum Carl Vilhelm Weihe, sáli setti á stovn. Á hesum virkinum arbeiða tríggir skrásettir grannskoðarar. Seinast tvey árini hava hesi feløgini havt nærum einarætt at grannskoða í Føroyum og hetta er eitt politiskt ynski, sambært Børsen.

justinus





Jógvan Sundstein og Pauli Ellefsen hava umframt at vera ríkisgóðkendir grannskoðarar tilfelags, at báðir hava verið løgmenn í Føroyum og framstandandi politikarar í drúgva tíð



Fíggjarmálaráðharrin:

Eg havi álit á okkara grannskoðarum

– At gera grannskoðararnar til syndabukk fyri tað sum farið fram í Føroyum er ikki heilt rætt, sigur Jóannes Eidesgaard, landstýrismaður

Fíggjarmálaráðharrin, Jóannes Eidesgaard skilir ikki rættuliga, hví Dagblaðið Børsen nú er farið at sáa iva um dygdina hjá teimum ríkisgóðkendu føroysku grannskoðarunum.

– Mær kunnugt eru tey stóru føroysku grannskoðarafeløgini limir í útlendskum ketum, har somu krøv verða sett til grannskoðararnar, uttan mun til hvørjum landi teir arbeiða í. Grannskoðararnir eru eisini undir eftirliti av FSR (Foreningur af statsautoserede revisorer) og tað er heilt burturvið at siga, at dygdin av arbeiðinum hjá føroysku grannskoðarunum ikki er eins góð sum hjá donskum, sigur Jóanes Eidesgaard.

– Skulu vit fýlast at føroysku grannskoðarafeløgunum, so vóru tey dekan og bjartskygd, tá tey settu projekt, virkisætlanir upp fyri fólk í áttatiárunum. Men grannskoðan er afturlítandi og eg havi fult álit á føroysku grannskoðarunum, sigur Jóannes Eidesgaard.

– Vit hava trý størri grannskoðaravirkir í Føroyum og vit royna at býta sól og vind eins millum hesi. Danir hava ikki nógv størri úrval, sigur hann.

– Danir kravdu í fyrstu avtaluni í 1992 at danska grannskoðaralóggávan fór at galda í Føroyum. Vit hava næstan skrivað hesa lógávu av, so tað er skeivt at siga, at vit hava útihýst donskum grannskoðarum. Hetta er gjørt eftir teirra egna ynski, sigur Jóannes Eidesgaard.

justinus



föroya fólkaháskúli

Vevskeið

á Háskúlanum

Skeið í veving verður á Háskúlanum frá **21. august til 1. september.**

Lærari: Poulina Jensen.

Kostnaður: 1.950 kr.
Tilmelding á tlf. 11743 / 22344.

Føroya Fólkaháskúli
Háskúlavegur 14 - 100 Tórshavn
Tlf. 11743 - Fax 19687